Góðu øll somul,

Tað er við gleði, at eg í dag bjóði tykkum vælkomin til hesa móttøku í nýstovnaða Barnahúsinum.

At seta á stovn eitt Barnahús í Føroyum er eitt mál, sum hevur ligið mær nær, og sum eg, saman við míni fyrisiting og avvarðandi myndugleikum, havi arbeitt miðvíst við seinasta árið.

*"Eitt samfelag, ið vil kallast mentað, eigur ongantíð at bera yvir við nøkrum slag av harðskapi.*
*Men andstyggiligastur av øllum er tó harðskapur móti børnum. Hann noyðir tey verjuleysastu og veikastu at tola vanæru, eyðmýking, mannminkan og órætt.*
*Har talan er um tey smáu, eiga vit tí at beina fyri hvørjum farvegi av harðskapi og misnýtslu."*

Hesi orðini eftir Nelson Mandela, sála, sum Hanus Kamban hevur umsett fyri okkum til júst hetta høvi, rakar seymin á høvdið.

Vit eiga ongantíð at góðtaka, at børn verða útsett fyri av harðskapi ella kynsligum ágangi.
Tó er tað greitt, at hetta kemur fyri – eisini her hjá okkum. Og tá eiga vit sum samfelag, so skjótt vit varnast tað, at gera okkara til, at tað steðgar, og at børnini fáa skjóta hjálp og ta vegleiðing, tey hava brúk fyri. Tað er okkara skylda, bæði sum myndugleiki – og sum borgarar annars – at gera okkara til at steðga harðskapinum.

Eg trúgvi, at við einum Barnahúsi, kunnu vit hjálpa børnunum nógv betur, enn vit higartil hava gjørt. Tí hóast barnaverndartænastur, heilsumyndugleikar og løgregla, longu sum er, virka um alt landið, og grípa inn, tá tey fáa fráboðanir, so verður barnið, við einum Barnahúsið, sett í miðdepilin.

Í Barnahúsinum koma myndugleikarnir til barnið, heldur enn at barnið skal ferðast frá einum myndugleika til annan.

Her fara myndugleikarnir at gera ein samskipaðan innsats við neyðugu kanningum og avhoyringum, so at barnið fær eitt heildartilboð til hjálp og viðgerð alt fyri eitt.

Tá eitt barn hevur verið fyri harðskapi ella kynsligum ágangi, hevur tað avgerandi týdning at grípa skjótt inn. Barnið hevur í tíðini, tað hevur verið fyri ágangi, ofta mist álitið á vaksin, og tað er umráðandi at vísa barninum, at nú verður hond tikið um trupulleikan, so at álitið og trúgvin uppá medmenniskjuni verður endurreist.

Tí er tað í avtalunu millum avvarðandi partar sett inn, at avhoyringar, sum løgreglan ger í samband við mál um kynsligan ágang og annan harðskap, verða framdar skjótast tilber og hava høga raðfesting hjá løgregluni.

Umframt at grípa skjótt inn, hevur tað eisini týdning fyri eitt barn, at barnið ikki skal endursiga hendingarnar – brotini framt ímóti teimum – aftur og aftur. Verður hetta kravt av barninum, endurlivur barnið hendingarnar aftur og aftur.

Hugskotið og tankarnir handan Barnahús-konseptið eru júst, at barnið, sum longu hevur verið fyri

traumatiserandi hendingum, ikki skal re-traumatiserast, sum tað eitur á fakmáli.

Barnahúsið verður fyri øll børn í Føroyum. Tað er lætt at koma til húsið, tað liggur mitt í býnum, samstundis sum eg vænti, at til ber at varðveita neyðuga anonymitetin, sum hevur týdning fyri at tryggja børnum neyðuga trygd og vernd.

Húsið er, sum tit síggja, innrættað við fleiri rúmum, har møguleikar eru fyri allar neyðugar funktiónir, m.a. við móttøkurúmi, avhoyringarrúmi, fundarhøli og arbeiðsrúmi.

Hetta skuldi verið góðir karmar at tryggja nøktandi arbeiðsumstøður hjá barnaverndartænastu, løgreglu og heilsumyndugleikum.

Men fyrst og fremst hava vit lagt dentin á at skapa barnavinarligar karmar, so at húsið kennist trygt og gott at koma til hjá børnunum.

Enn er óvist, hvussu nógv mál fara at verða í Barnahúsinum. Higartil hava vit Føroyum havt um 10-15 mál av hesum slag um árið, men royndir úr øðrum londum vísa, at tá Barnahús er sett á stovn, verða tað fleiri, sum venda sær til Barnahúsið og at talið tí verður nógv størri enn mann av fyrstani tíð, helt fóru at verða.

Tí hava vit valt at fara varliga fram. Tað er Barnaverndastova Føroya, ið hevur ábyrgdina av húsinum, og av at tryggja at neyðuga starvsfólkaorkan verður nýtt á frægasta hátt. Adressan og telefontænastan verður hjá Barnaverndarstovuni.

Barnaverndarstovan ferð síðani at eftirmeta so hvørt, hvør tørvurin á starvsfólkaorku er, og um neyðugt verður at seta fólk í starv í Barnahúsinum.

Eg fari í hesum sambandi at takka leiðaran fyri Barnaverndarstovuna, Oddbjørg Balle, fyri hennara áhaldandi eldhuga í hesum arbeiðið. Hon hevur gjørt eitt stórt arbeiði at fáa húsið klárt, so at virksemið kann byrja beint eftir nýggjár. Oddbjørg hevur við síni nærlagni lagt nógva orku í at gera Barnahúsið til eitt hugnaligt og barnavinarligt umhvørvið, har barnið skal kenna seg væl. Takk fyri tað, Oddbjørg!

Samstundis fari eg at takka embætisfólkunum í Almannamálaráðnum fyri teirra drúgva arbeiði at fáa alt sum er neyðugt fyri at skipa Barnahúsið uppá pláss, eisini at fáa skipa samstarvi millum avvarðandi myndugleikar í eina avtalu, sum vit hava undirskriva fyrr í dag.

Eisini fari eg at takka avtalupørtunum – kommunurnar, løgreglan og heilsumyndugleikarnir – fyri gott samstarv og fyri teirra leiklut soleiðis at málið, sum var at lata Barnahúsið upp í ár, gjørdist veruleiki.

At enda fari eg at ynskja okkum øllum hjartaliga til lukku við nýstovnaða Barnahúsinum, og ynskja teimum, sum í sínum arbeiðið ella sum brúkarar, fara at koma í Barnahúsinum, blíðan byr.